LM-067/2022

fylgiskjal 4

Kommunufelagið

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

Dagfesting
31. august 2021

Okkara j.nr.
21/03495

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
21/03451

Hoyringsskriv viðv. uppskoti til løgtingslóg um náttúruvernd v.m.

Landsstýrið sendi 23. juli 2021 uppskot til nýggju náttúruverndarlógina og broytingaruppskot til náttúrufriðingarlógina í hoyring. Kommunufelagið hevur viðgjørt uppskotini á stýrisfundi 3. september 2021, og hevur niðanfyristandandi viðmerkingar til málini.

Nýggj náttúrufriðingarlóg

Kommunufelagið metir tað ikki vera góða lógartekniska mannagongd at gera so víðfevndar broytingar í náttúrufriðingarlógini, sum lagt verður upp til.

Munandi partar av lógini verða sostatt strikaðir og í grundini verður lutfalsliga lítil partur av lógini eftir, um allar broytingarnar verða samtyktar í verandi líki. Gjørt upp í §-tali, so verður lagt upp til at strika umleið helmingin av lógini.

At fremja so víðfevndar broytingar/strikingar fer sannlíkt at hava óhepnar avleiðingar við sær. Í besta føri verður lógin trupul at umsita og gjøgnumskoða – og í ringasta føri verða skeivar ella ólógligar avgerðir tiknar.

Sum dømi um eina broyting, sum tykist óheppin er strikingin av § 9. Tilsvarandi grein verður ikki sett í staðin og tí tykist broytingin hava ta avleiðing, at varðveitsluskyldan viknar, og at "... *øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi, eyri, leiri, plantum og djórum...* " ikki longur verður forboðin. Hetta kann hava stak óhepnar avleiðingar fyri náttúru og umhvørvið í landsins kommunum, og tí verður mælt til at tryggja, at innihaldið í § 9 ikki verður strikað

Skulu allar broytingarnar fremjast verður í staðin mælt til at gera eina nýggja lóg við nýggjum samanhangandi viðmerkingum. Harvið verður øll lógin – sum hevur sín uppruna í 1970 – dagførd. Í sama viðfangi hevði borið til at víðkað viðmerkingarnar og tillaga lógartekstin við teimum royndum, sum friðingarmyndugleikar o.o. hava gjørt sær hesa fjórðingsøld síðani seinastu lógarbroyting í 1995.

Ein annar møguleiki er at landsstýrið samantvinnar lógirnar í eina felags náttúruverndar- og -friðingarlóg.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Kommunufelagið

Í øllum førum mælir Kommunufelagið frá at fremja nevndu broytingar í verandi líki.

Sum málslig viðmerking kann skoytast uppí, at undirheitið á lógaruppskotinum vísir á avtøku av friðingar*nevndum* heldur enn friðingar*heimildum*, ið er høvuðsinnihaldið í lógini.

Kommunal umboðan í friðingarnevndum

Kommunufelagið mælir til, at hetta høvið verður nýtt til at dagføra tilnevningarnar til friðingarnevndirnar.

Kommunurnar hava eins stóran áhuga í friðingarmálum og landið hevur. Kommunurnar í dag eru eisini munandi sterkari eindir enn tær vóru, tá ið upprunalógin varð sett í gildi fyri hálvari øld síðani. Tí má hesin søguligi skeivleikin rættast.

Ítøkiliga verður mælt til, at valið til friðingarnevndirnar og til Yvirfriðingarnevndina verður umskipað soleiðis, at annar av limunum hjá landsstýrinum verður latin kommununum at velja. Somuleiðis eiga helvtin av tiltakslimunum hjá landsstýrinum at verða latin kommunum at velja.

Kommunufelagið mælir til, at ásetingarnar í §§ 10-11 í lógini verða broyttar samsvarandi hesum tilmæli.

Heimildir landsstýrismansins

Landsstýrismaður fær í uppskotinum til náttúruverndarlóg munandi og víðar heimildir at skipa føroyska náttúruvernd við kunngerð. Eisini fær landsstýrismaðurin í ávísum føri heimild at geva undantøk frá viðkomandi kunngerð – umframt at landsstýrismaðurin fær ávísar heimildir at geva loyvi.

Ein avleiðing av hesum er, at Løgtingið verður biðin um at samtykkja umfatandi regulering, sum ikki kann viðgerast í tinginum – tí reguleringin er ikki orðað enn. Og kommunur og onnur áhugaði verða biðin um at viðmerkja yvirskipaðar rammulógarorðingar, sum vit ikki kenna avleiðingarnar av í verki – tí hetta skal fyri tað nógva orðast í kunngerð.

Tað er fult og heilt ein politisk avgerð at geva landsstýrismanninum hesar heimildir. Tá ið talan er um heilt nýggja lóggávu, tá eiga uppskot til kunngerðir tó fyriliggja saman við lógaruppskotinum, so allir viðkomandi partar kunnu fáa eina veruliga ímynd av tí regulering, sum ætlandi skal setast í verk.

Kommunufelagið metir eisini, at tað í hesum sambandi eiga at vera sett krøv til kunngerðar-fyrireikandi arbeiðið hjá landsstýrismanninum, soleiðis at landsstýrismaðurin skal biðja um tilmæli frá viðkomandi myndugleika – ella frá viðkomandi yrkiskunnleika, um ongin beinleiðis

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Kommunufelagið

myndugleiki er á økinum. Hetta krav eigur at verða lógarásett, og kann virka fyri einari størri dygd í arbeiðinum og – ikki minst – størri áliti á, at tær ásetingar, sum verða settar í verk, byggja á viðkomandi fakligar metingar.

Sum málslig viðmerking verður mælt til at eftirhyggja § 11, stk. 2. Í ásetingini verður víst til § 26. Um samanborið verður við serligu viðmerkingarnar, so verður har víst til § 28.

Avleiðingar fyri kommunurnar lýsast

Í almennu viðmerkingunum, smb. pkt. 2.1-2., verður upplýst, at náttúruverndarlógaruppskotið ikki kann væntast at fáa ávikavist fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Samsvar tykist ikki vera millum hesar útsagnir og ta talvuna, sum lýsir samlaðu avleiðingarnar av uppskotinum, smb. pkt. 2.17.

Mælt verður til, at hetta verður eftirhugt ella greinað nærri. Um neyðugt eigur ráðið at skipa fyri nýggjari (snar)hoyring fyri kommununum og øðrum viðkomandi pørtum.

Vegna
Kommunufelagið

Janus Haraldsen
Løgfrøðingur

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo